## Brúðarparið fylgist

Tað er siðvenja í Føroyum, at brúðarparið fylgist inn í kirkjuna. Í øðrum londum kemur brúðgómurin fyrst í kirkjuna, og síðani verður brúðurin leidd inn av pápanum. Sonja Klein heldur, at føroyska siðvenjan er tann betra. - Summi fólk spyrja, um tey kunnu gera sum uttanlands, har brúðgómurin kemur í kirkjuna fyrst, og um tey veruliga vilja tað, so loyvi eg teimum. Men eg mæli teimum til at koma í kirkjuna saman. Eg havi roynt bæði, og eg haldi, at tað er sterkari og flottari, at brúðarparið kemur inn í senn, sigur Sonja Klein. - Harafturat eru vit føroyingar eitt sindur framman fyri onnur við javnstøðu í hesum førum, og tað skulu vit halda fast við, sigur hon.





# Stóri da
# og fami

**– Eg havi havt nógvar góðar vígslur, og tað er altíð hugaligt at gifta fólk, men sjálvsagt var hendan vígslan nakað serligt fyri meg, nú tað var dóttrina, sum eg gifti, sigur presturin Sonja Klein. Vit hittu prestin til eitt prát um serliga dagin og um hjúnabandið sum heild**

*– Eg var eitt sindur nervøs undan vígsluni, tí hetta var ein so stórur dagur fyri okkum øll. Eg vildi gjarna hava, at vígslan ikki gjørdist til nakað ov privat fyri okkum, men at eg var í leiklutinum sum prestur og ikki bara sum mamma, sigur Sonja Klein*

*Myndir Edith Johannesen*

Sosialurin